

*Útsýni frá brúnni á einum LPG*



**Kvívíkingurin Jan Joensen er projektleiðari á heimsins størstu skipasmiðju í Suðurkorea. Jan, sum er 43 ára gamal, lærdi í síni tíð á Tórshavnar Skipasmiðju, fór til Danmarkar at læra til skipsverkfrøðing, og fór síðani at arbeiða hjá altjóða felagnum Lloyd's Register. - Tað er einki at dylja yvir, at lønin dregur, tá tú verður sendur í onnur lond at arbeiða, sigur hann**

ÚTISETI
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Nevnir tú navnið Hyundai, so munnu tey flestu hugsa um bilarnar, sum minna nokkso nógv um Honda. Fáur man hugsa um heimsins størstu skipasmiðju í Suðurkorea, sum byggir útvið 100 skip um árið – skip ið eru bæði stór og dýr til frálandavinnuna og farmaflotan.

*"Suðurkoreanar arbeiða hart og halda ikki langar steðgir. Tað er full ferð á alla tíðina"*

Men í landssynningspartinum av Suðurkorea, í býnum Ulsan, arbeiðir 43 ára gamli Jan Joensen úr Kvívík á hesi risa stóru skipasmiðjuni hjá Hyundai Heavy Industries, bert 3 kilometrar frá har bilaverksmiðjan Hyundai liggur. Saman við konuni og báðum synunum hevur Jan búð og starvast í Ulsan seinasta hálvafjórða árið

Sosialurin hitti Jan Joensen, nú hann var heima í Kvívík og vitjaði familju sína í summarferiuni.

## Útstationering

Jan Joensen traðkaði sínar ungdómsskógvar á Tórshavnar Skipasmiðju, har hann lærdi til sveisara. Liðugur við tað fór hann til Danmarkar at læra, fyrst til skipsbyggjara og síðani á teknikum í Helsingør til skipsverkfrøðing.

Hann fekk starv hjá altjóða fyritøkuni Lloyd's Register, ið tekst við klassing og nýbygging av skipum. Hetta er ein aldargomul fyritøka, ið hevur sín upprunа í Onglandi, og sum í dag virkar kring allan knøttin.

- Føroyingar kenna nokk mest til Norsk Veritas, tá tað kemur til hetta slag av virksemi. Lloyd's og Veritas gera stórt sæð sama slag av arbeiði, vit eru kappingarneytar, greiðir Jan Joensen frá.

Eg spyrji Jan Joensen, hvussu hann endaði í Suðurkorea.

- Tá ein arbeiðir í sovorðnari fyritøku, verður ein viðhvørt spurdur um at fara aðrastaðni at arbeiða. Viðhvørt spyr ein um tað sjálvur. Eg arbeiddi í Kina áðrenn og ynskti sjálvur at sleppa til Korea. Suðurkorea er øðrvísi enn nógv onnur lond har á leiðini, nógv øðrvísi enn til dømis Kina, Vietnam og Filipsoyggjar. Landið kann í dag mest samanberast við Japan, og kostnaðarstøðið er høgt, nærum eins høgt og í Føroyum, greiðir Jan Joensen frá og heldur fram:

*»Suðurkoreanar eru stoltir av sínum arbeiði«*

- Sjálvt arbeiðið broytist ikki nógv frá stað til stað, so eg visti, hvat eg fór inn til. Bæði arbeiðsplássið og skúlin, har dreingirnir ganga, liggja beint við har vit búgva. Har er friðarligt, eingin kriminalitetur, so vit hava einki at klaga um.

Gularótin hjá fleirtjóða fyritøkum at fáa fólk í onnur lond at arbeiða, ella verða útstationerað, er oftani ein feitari lønarposi. So eg spyrji Jan, um tað eisini er galdandi í hansara føri.

- Tað er einki at dylja yvir, at bæði eg og mínir starvsfelagar fáa meiri løn, tá vit verða útstationeraðir, sigur Jan Joensen.

## Álitisstarv og stórar verkætlanir

Jan Joensen er projektleiðari fyri nýbygningar av slagnum LPG, ið stendur fyri "liquified petroleum gas". Talan er um klassing av hesum nýbygningunum, líka frá tí at kjølurin verður strektur, til skipið verður latið eigaranum.

- Arbeiðið inniber millum annað at halda eyga við, at nýbygningarnir lúka øll altjóða krøv sambært galdandi løgum, krøv sum eru tengd at hvat slag av skipum, talan er um, sigur Jan Joensen.

Hyundai skipasmiðjan, har Jan hevur sína dagligu gongd, hevur rópt seg sjálva "global leader" innan skipasmíð. Tað vil við øðrum orðum siga heimsins største skipasmiðja. Jan Joensen

*»Tey ungu (í Suðurkorea, red.) hava eftir mínum tykki einki lív«*

greiðir frá, at eitt annað kent altjóða merki, Samsung, hevur eisini eina risa stóra skipasmiðju, sum liggur bert 2 tímar frá, har Hyundai skipasmiðjan liggur. Á Samsung skipasmiðjuni gera tey nógva útgerð til frálandavinnuna, so sum boripallar og líknandi.

- 'Hyundai Heavy Industries' er heimsins største skipasmiðja. Tað er eingin onnur skipasmiðja, sum byggir so nógv skip. Tað arbeiða 25.000 fólk á sjálvari skipasmiðjuni, men hartil eru 20.000 undirveitara arbeiðspláss afturat uttan fyri smiðjuna sjálva. Har eru nógvar deildir, onkur tekur sær bert av at veita skipini, onkur onnur tekur sær bert av doyping við orkestrum og móttøku og so framvegis, sigur Jan Joensen.

Umframt nýbygningar byggir skipasmiðjan eisini eina rúgvu av deilum og motorum til aðrar skipasmiðjur. Og tað eru ikki hissini motorar.

- Umleið 500 motorar verða bygdir um árið, og tað eru motorar á støddd við heili hús, heldur kvívíkingurin fyri.

## Nógv øðrvísi enn Føroyar

Eftir at Jan Joensen hevur greitt frá øllum omanfyri, gevur tað lítla meining at spyrja, um arbeiðið á Hyundai skipasmiðjuni á nakran hátt kann samaberast við til dømis Tórshavnar Skipasmiðju. Tað man vera sum dagur og nátt at samanbera heimsins størstu skipasmiðjum við eina føroyska skipasmiðju, og tað váttar Jan.

Men hvussu gongur arbeiðið so fyri ein vanligan dag har eysturi.

- Vit arbeiða vanligar dagar, gera nógv ymisk ting, til

*»Børnini ganga í skúla frá klokkan átta á morgni til seint á kvøldi«*

| Øll tøl fyri 2007 | Suðurkorea | Føroyar |
|---|---|---|
| BTÚ pr. íbúgva í miðal | uml. 130.000 krónur | uml. 250.000 krónur |
| Búskaparvøkstur | 5% | 9,3 % |
| Arbeiðsloysi (árstíðarjavnað) | 3,3% | 1,5 % |

Keldur: CIA, The World Factbook (tøl fyri Suðurkorea). Hagstova Føroya og Landsbanki Føroya (tøl fyri Føroyar).